# ítróttur

Nr. 221 • hósdagur • 20. november 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Skulu hava greiðari reglur

**Tað er ikki víst, at tað fer at verða so nógv lættari at fáa fólk til landið, men í øllum førum vilja vit hava eina greiða mannagongd, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*

Greitt er nú, at málið viðvíkjandi útlendingum í føroyskum ítrótti verður eitt mál, sum skal hava eina politiska viðgerð, áðrenn nakað meira hendir í hesum.

Torbjørn Jacobsen, fólkatingslimur, hevur boðað frá, at hetta verður ein partur av tí, sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður, og Bertel Haarder, integratiónsministari, skulu hava greiðu á, tá teir hittast um eina viku.

Umframt ítróttarfólkini, so eru sjálvandi nógv onnur viðurskifti, sum viðvíkja málinum um útlendska arbeiðsmegi, men Høgni Hoydal sigur tó, at hann vónar at fáa eina greiðu á hesum partinum av málinum.

- Orsøkin til, at eg vendi mær til danska útlendingastýrið var, at hetta málið við útlendingunum í hondbóltinum nú tók seg upp, og ikki minst, hvussu tað tók seg upp.

- Her í Føroyum hava vit jú ikki havt serstakar reglur



*Longu í komandi viku fer Høgni Hoydal á fund við Bertel Haarder, har millum annað viðurskiftini hjá útlendskum ítróttarfólkum verða umrødd*

á økinum, og vit vóru heldur ikki kunnaðir um, hvussu júst hesin parturin av málinum varð umsitin í Danmark. Arbeitt hevur jú verið við eini yvirtøku av málinum, og fyri mín part kann eg bara siga, at hon heldur skuldi verið í gjár enn í dag, men tað tekur so sína tíð, sigur Høgni Hoydal.

- Viðvíkjandi ítróttarfólkunum, so er tað tó neyðugt, at vit nú finna eina loysn, sum eisini kann verða galdandi fram til eina yvirtøku av málinum. Fyrst og fremst er neyðugt, at tað er myndugleiki, sum ábyrgdina á økinum. Sum er, so hevur tað verið alt ov fløkt hjá teimum, sum hava roynt at fingið fólk til landið, og ein avleiðing av hesum hevur verið, at málsviðgerðin verður alt ov drúgv. Tað er ikki nakað, sum ítróttarfeløgini kunnu liva við. Tey hava ofta tørv á eini skjótari avgreiðslu av málunum.

Júst avgreiðslutíðin er eisini nakað, sum landsstýrismaðurin leggur stóran dent á hesum viðvíkjandi, og við einum myndugleika á økinum vónar hann, at hendan kann styttast munandi.

- Hinvegin er tað ikki víst, at tað verður so nógv lættari at fáa fólk til landið, tí tað verða framvegis ymisk krøv galdandi. Men tá hava vit eina greiðari skipan, sum ger tað einfaldari at arbeiða við málinum, har tað vónandi verður talan um munandi styttri avgreiðslutíð, sigur altso Høgni Hoydal at enda.

# Fútin liðugur

**Sum seinasta krúllan á útlendingamálinum hevur VÍF fingið svar upp á sín fyrispurning til fútan, og í hesum verður eisini staðfest, at einki er um skuldsetingarnar móti einum starvsfólki hjá fútanum**

ÚTLENDINGAMÁLIÐ
*Jákup Mørk*

Ringurin viðvíkjandi útlendingamálinum í hondbóltskappingini tykist nú vera endaður.

Týsdagin fekk VÍF skriv frá fútanum, har fútin svaraði teimum spurningum, sum vestmenningar settu fyri góðum mánaði síðani.

- Jú, vit hava fingið svar upp á okkara fyrispurning. Tað kom við postinum týsdagin, og har staðfestir fútin, at tey hava kannað tey trý feløgini, sum vit nevndu í skrivinum, sigur Jógvan Sigurd Poulsen, formaður í VÍF.

Í skrivinum bað VÍF annars um at fáa at vita, hvørt tey í Vestmanna høvdu gjørt nakað skeivt, og tí áttu tað helst at verið fýra feløg, sum skuldu kannast, men nú er so staðfest, at meira verður ikki gjørt við málini, fyrr enn politisk útmelding er komin um viðurskftini. Og Jógvan Sigurd sigur eisini, at tey í VÍF ikki hava ætlanir um at gera meira við málið her og nú.

## Eingin slatraði

Meðan málið hevur rumblað í føroysku miðlunum hesa seinastu vikuna, hevur navnið á Lindu Hesselbjerg, fulltrúi, ofta verið havt á munni. Bæði tí hon hevur verið tann, sum hevur havt málið um hendi, og ikki minst tí tað ljóðaði – eftir útsøgn frá VÍF – at hon á eini flogferð hevði gjørt tey í VB varug við málið.

Hetta seinasta avnoktar fútin staðiliga í brævinum til VÍF. Har verður nevnliga staðfest, at Linda Hesselbjerg ongan kunnleika hevði um málið, fyrr enn hon 26. oktober kom aftur til Føroya, og at hon sostatt ómøguliga kundi havt kunnað VB um málið fyri hetta.

Sostatt tykist útlendingamálið í fyrstu atløgu at verið liðugt, og í øllum førum munnu ítróttarfeløgini kring landið vera fegin um, at útlit eru fyri einari varandi loysn á hesum økinum.





# Clayton á Sandi

**Brasilski áleyparin hjá vágamonnum fer komandi árið at spæla við B71**

LEIKARASKIFTI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hetta staðfestir heimasíðan hjá B71, www.b71-sandoy.com.

Clayton kom til landið undan kappingarárinum í fjør, tá hann serliga í fyrru hálvu var við til at skjóta FS Vágar upp á uppflytingarsessin, sum teir eisini hildu fast um alt kappingarárið. Seinnu hálvu tað árið var hann tó fyri tað nógva skaddur, men avrikið fram til hetta var tó somikið gott, at tey í Vágum ikki ivaðust í at halda fast um leikligu dygdir hansara, tá farast skuldi undir kappingarárið 2003.

Eisini her megnaði hann at gera nakað um seg, og við sjey málum var hann besti málskjúttin hjá FS Vágum, men hóast hetta, so endaði árið sum kunnugt við niðurflyting.

‘ Komandi árið verður tað so í B71, at Clayton skal skjóta málini, og einki er at ivast í, at sandoyingar eru fegnir um styrkin. Ikki minst tí júst málskjótingin mundi vera størsti trupulleikin hjá liðnum í fjør.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 6 | 4 | - | 2 | 15 | 6 | 9 | 8 |
| 2 Mjølnir | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 8 | 5 | 8 |
| 3 KÍF | 6 | 4 | - | 2 | 13 | 11 | 2 | 8 |
| 4 Dráttur | 6 | 3 | - | 3 | 13 | 12 | 1 | 6 |
| 5 ÍF | 5 | 2 | - | 3 | 7 | 9 | -2 | 4 |
| 6 Fleyr | 7 | 1 | - | 6 | 5 | 20 | -15 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 0 | 12 | 8 |
| 2 ÍF | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 5 | 7 | 8 |
| 3 SÍ | 5 | 3 | - | 2 | 11 | 8 | 3 | 6 |
| 4 Fram | 5 | 1 | - | 4 | 5 | 13 | -8 | 2 |
| 5 Fleyr | 5 | 0 | - | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |

# Jákup Thomsen gevur klavertónar út

**Klaversnillingurin Jákup Thomsen hevur givið fløgu út, ið kallast Klavertónar og við hesum er m.a. vælkenda Romansan at fáa á fløgu, eftir at hava verið at hoyrt í Útvarpinum í mong ár**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Jákup Thomsen er framúr klaverleikari og hevur í nøkur ár verið klaverleikari burturav í Oslo*




*Vágseiðið er á fløguhúsanum á nýggju fløguni, ið Jákup Thomsen gevur út*

Vágbingurin Jákup Thomsen er væl kendur klaversnillingur. Og nú gevur hann fløgu út við klavertónleiki. Á fløguni eru 11 verk ella løg og eisini vælkenda Romansan er at hoyra. Hon hevur verið at hoyra í ÚF í mong ár.

Jákup Thomsen hevur í áravís havt tónlekin sum livibreyð. Hann býr í dag í Oslo og er klaverleikari á hotellum og caféum.

Tónleikaleiðin byrjaði í Vági og kendt er m.a. singleplátan við bólkinum Robert, Jákup og Ólavi, ið kom í 1977. Har var Harmonikusørin ein slagari og eisini lagið Traffic gjørdist kent og tykist at standa seg enn, hóast tíðartonn. Hetta lag skrivaði Jákup. Hann hevur skrivað ymiskt millum ár og dag og eigur t.d. eisini lagið til "Tað er leygarkvøld í kvøld", ið er fólkaogn.

Tey 11 løgini á fløguni eru yndisligur klavertónleikur fyri stóran part og okkurt lag swingar eisini, t.d. Túnadansur.

Jákup hevur skrivað øll løgini og leikar klaver og onnur tangentljóðfør. Hann hevur eisinistaðið fyri upptøkuni. Fløgan er margfaldað í Týsklandi.

Forsíðumyndin er av Vágseiði og eitt lag hevur eisini sama heitið. Bjartur V. Joensen tók myndina.

Tutl marknaðarførur fløguna og hon fæst kring alt landið.

# Tættari í oddinum

**Fuglfirðingar togaðu seg týskvøldið ájavnt Mjølni í meistaradeildini hjá monnum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tveir dystir vórðu leiktir í flogbóltskappingini týsdagin.

Í Hoyvíkarhøllini tók Fram ímóti ÍF, og her gjørdist úrslitið ikki óvæntað, at fuglfirðingar vunnu tryggan 3-0 sigur.

Við sigrinum er ÍF nú ájavnt Mjølni á stigatalvuni, men klaksvíkingarnir hava tó leikt ein dyst færri.

Á Giljanesi vitjaðu kvinnurnar hjá Fleyr, og her høvdu tær helst vónir um eina endurtøku av einasta sigrinum, sum tær hava vunnið á árinum, men hetta gjørdist tó av ongum. Fleyr mutaði ímóti eina løtu, men endaliga úrslitið gjørdist tó ein 3-1 sigur til Drátt, sum við hesum bert er tvey stig aftan fyri tey trý oddaliðini í deildini.

# Elektron snýr sær uttanum

**Tað ræður um at snúgva sær. Elektron gevur nú viðskiftafólkunum hjá bankunum eitt fiff, so teir kortini kunnu melda seg til Gjaldskipanina hjá peningastovnunum, ið mest sum er steðgað av Dátueftirlitinum**

PBS-MÁLIÐ
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Nýggjar sjálvvirkandi flytingar kunnu ikki stovnast í Gjaldskipanini gjøgnum føroysku peningastovnarnar. Tað er avleiðingin av avgerðini hjá Dátueftirlitinum tann 28. oktober.

Men nú heldur Elektron seg hava funnið ein útveg, so nýggir gjaldarar kortini kunnu koma upp í skipanina. uttan um peningastovnarnar.

– Galdandi kunngerð, sum einans er miðað ímóti føroyskum peningastovnum, er ikki til hindurs fyri, at ognarar gera avtalu við PBS um at greiða uppkrøv gjøgnum danska makan hjá Gjaldskipanini, BetalingsService, sigur Elektron í einum tíðindaskrivi.

Hetta líkist einari roynd at koma uttan um kunngerðina, ið skal forða fyri, at upplýsingar í sambandi við peningaligar flytingar millum fólk og fyritøkur í Føroyum, liggja uttanlands.

Elektron sigur, at tað einasta, sum er galdandi, er at avtalur um sjálvvirkandi flytingar ikki kunnu fara um diskin hjá einum føroyskum peningastovni. Viðskiftafólk kunnu frítt melda seg í Gjaldskipanini, um ognari teirra hevur avtalu við PBS, eins og viðskiftafólk um homebanking skipanina frítt kunnu greiða gjaldingar gjøgnum Gjaldskipanina.

Sostatt er einki til hindurs fyri, at skuldarar – gamlir sum nýggir – gera nýtslu av teimum gjaldsmøguleikum, sum eru í Gjaldskipanini, sigur Elektron í tíðindaskrivinum.

Eftir fatan Elektrons er avgerð Dátueftirlitsins ikki sambærilig við løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, og Elektron hevur sostatt tann 30. oktober 2003 lagt avgerð Dátueftirlitsins fyri Føroya Rætt at taka støðu til. Elektron hevur annars heitt á Dátueftirlitið um at lata sakarmálið hava útsetandi ávirkan á avgerðina frá 28. oktober 2003.

Dátueftirlitið hevur ikki gingið hesi umbøn á møti, og føroysku peningastovnarnir kenna seg tí noyddar til fyribils at steðga øllum nýggjum tilmeldingum til sjálvvirkandi gjaldingar í GjaldSkipanini.